## DAGSINS MEINING

# Ruðuleikin fullkomin

Sambært løgmanni skal dagurin í dag avgerandi fyri, hvat víðari hendir í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya. Í dag skulu vit fáa at vita, um føroyingar skulu til eina fólkaatkvøðu 26. mai, eins og áður er boðað frá, ella um fólkaatkvøðan í staðin verður 14. september ella avlýst.

Vit skulu á hesum stað ikki taka avgerðina fyri løgmann. Men nógv bendir á, at hann fer at avlýsa fólkaatkvøðuna. Bakland løgmans í Fólkaflokkinum vágar sær ikki út til eina fólkaatkvøðu um eitt uppskot, sum frammanundan er dømt til at falla. Flokkurin heldur vandan við at tapa fólkaatkvøðuna vera størri enn vinningin við at vinna hana

Fólkaflokkurin viðgjørdi týskvøldið lógaruppskotið hjá Høgna Hoydal um fólkaatkvøðuna. Niðurstøðan av hesum fundi var, at løgmaður skuldi gera av, um fólkaatkvøðan verður hildin 26. mei, ella at hon verður avlýst. Fólkaflokkurin vil ikki, at fólkaatkvøðan skal verða útsett.

Sjálvstýrisflokkurin hevur eisini viðgjørt lógaruppskotið um fólkaatkvøðuna. Hann heldur tað vera best at útseta hana til 14. september. Hann metir landsstýrið til ta tíð hava størri møguleika fyri at sannføra veljaran um, at tað er rætt at atkvøða ja.

Tjóðveldisflokkurin stendur fast við sítt. Hann vil hava fólkaatkvøðu 26. mei, eins og áður boðað frá.

Stóri spurniguri í dag verður tí helst, um Tjóðveldisflokkurin enn einaferð gongur við til at melda út eitt nýtt útspæl frá landsstýrinum, fyri at varðveita sín sess í landsstýrinum og framhaldandi royna at skapa eina fólkaøsing móti Danmark, soleiðis at tað eydnast at fáa fólkið við uppá fullkomnu loysn teirra - sum er fullkomin loysing.

Løgmaður hevur enn einaferð fríggjað til Javnaðarflokkin. Spurningurin er so, um hann enn einaferð ger hetta fyri at leggja trýst á Tjóðveldisflokkin. Er tað so, og landsstýrið aftur nú kemur við nýggjum útspæli, er politiski glæntrileikurin um fullveldi fullkomin. Útmelding eftir útmelding í trý ár uttan nakað ítøkiligt úrslit at vísa á.

Skal løgmaður betra um úrslit sítt til næstu veljarakanning og til komandi val, eru ráð okkara til hansara at skriva út nýval ella skipa nýggja samgongu.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Kristian Magnussen 45 ár

Í gjár fylti Kristian Magnussen, løgtingsmaður, 45 ár. Kristian Magnussen varð fyrstu ferð valdur á ting fyri Verkamannafylkingina í 1994. Til valið 1998 stillaði hann upp fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi, og varð valdur á ting við 705 atkvøðum.

Kristian er sonur Miu og Eliesar Magnussen í Vági. Hann er giftur við Bjørg Róin, dóttir Lill og Jógvan Róin. Hann hevur skrivstovuútbúgving og útbúgving sum sosialrágevi, og starvast hann hálv tíð sum sosialráðgevi hjá Tórshavnar býráð.

Av politiskum álitisstørvum hjá Kristiani kann nevnast, at hann var formaður í løgtingsins almanna- og heilsunevnd 1994-95. Formaður Formaður í løgtingsins trivnaðarnevnd juli 1995 - oktober 1996. Landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum frá oktober 1996 til mars 1998.



### Minningarorð um Dianu Lundsbjerg, Fuglafjørður

Aftur ein sangari hevur lagt frá sær. Jólini vóru ikki farin frá gørðinum, tá ið Diana andaðist 4. januar í ár áttatitvey ára gomul. So er øskukalt hjá Jacob og Dianu Lundsbjerg. Snøgg vóru tey, tá ið tey fóru av Høvdanum heim í bygdina og snøgg vóru tey, tá ið tey ár um ár , viku eftir viku og kvøld um kvøld komu til venjingar í sangkórinum. Hann sum fram úr góður basssangari, góður harmonikuleikari og hon sum ein yndislig sopran. Tá var himmalin á Guðs grønu jørð, og ljómur rann av sangaragleði á grønum vølli í ár so mong. Tey vóru millum tey fyrstu, sum myndaðu kórið, og trúføst vóru tey móti Fuglafjarðar sangkóri allar sínar dagar.

Jacob og Diana vóru í familju. Tey vóru av tí musikalska Kleinaslagnum. Fýra systkin komu av Strondum og búsettust í Fuglafirðir. Tey høvdu øll Klein til eftirnavn. Tríggjar gentur og ein drongur. Magnus (abbi Dianu) giftist við Nicolinu, Gamli Símun giftist við Suffíu, Kathrina (Stranda Kathrina) giftist við Pól Vesturi í Húsi og Elin giftist við Hans Klein. Hans var abbi til Jacob Lundsbjerg, sostatt vóru Diana og Jacob trímenningar. Elin var fastir til faðir, sostatt vóru vit báðir Jacob og greinskrivarin trímenningar.

Faðir Dianu, Johannus í Lon var tvær ferðir giftur. Báðar konurnar vóru av Syðradali á Kalsoynni. Fyrra æt Margretha og seinna æt Súsanna Maria. Brøðurnir báðir, Jógvan og Johannus í Lon vóru so fyrimyndarliga musikalskir. Altíð vóru teir í góðum hýri, og ikki taki eg munnin ov fullan, tá ið eg sigi, at teir sungu sum unglingar á ellisárum, tí væl minnist meg teir syngja í kirkjuni og á møti við klingandi, reinari rødd langt upp í árini.

Í okkara huga búðu fólkini á Høvdanum í eini aðrari verð. Hetta var so langt av leið, hildu vit á Bakkanum. Børnini, sum búðu um hesar leiðir, høvdu so langt at ganga. Um kvøldarnar, tá ið leitað var upp hús, hvurvu tey burtur í myrkrinum, tá ið komið varð um Kirkjurygg. Tey vóru eins og einbýlisbúgvar. Faðir plagdi at tosa um, at hann og pápin, Thomas Johan plagdu sunnudagar, at fara norður á Høvda at vitja Elina, og var tá bert ein rás at ganga eftir. Mangan minnist meg bæði Jakku og Dianu taka til orðanna, um hvussu gott var at búgva her. Tað var so liviligt. Bert eitt hanagleiv oman á Ringin fyri at fáa pottin á reiggj. Neystið hjá Gamla Lundsbjerg var eisini skamt ífrá, so tað var annar hugni og onnur kor, sum tey høvdu, áðrenn Sildaverksmiðjan kom. Eingin metir einbýlið við tað, tað er vert. Soleiðis hevur tað altíð verið.

Fólk eldast væl í dag. Fert tú á pensjonistaveitslu, so skalt tú síggja, menn sum eru fattir í herunum, kvinnur so mjúkar sum fitjur á selum, og anga av alskins luktilsi, og tað er ikki av tí bíligasta slagnum. Um Dianu vil eg siga, at hon sanniliga kom undir henda bólk av pensjonistum, og tað er gott, at svá er. Hesi fólk, sum í dag eru komin til ellisár, hava slitið í tí, og hugsi eg, at tað er gott hjá teimum, at síggja, at tað sum tey stríddust fyri, at fáa ein størri javna í samfelagið, hevur partvíst eydnast, hóast langt er á mál.

Diana var ein av teimum eldru vinkonunum millum Kirkjurygg og Enni, og saknað verður hon. Dagliga gekk hon tað langu leið heim í bygdina smáørindi, og onkuntið fekk hon eitt ”lift” frá einum basssangara, sum er farin upp um miðjan aldur, og tá gekk prátið upp á tað besta. Hugsaði ikki um, at Diana var farin upp um tey áttati, men so var. Eingin skal um sín dag ganga, og so er hjá okkum øllum. Diana og Jacob syngja nú við í einum fragari kóri, og tað er teimum væl unt.

**Frits Johannesen**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Fara nú at krevja pengarnar aftur

**Kommunur, sum ikki játtaðu at pengar úr Kommunala Veðhaldsgrunninum varð brúktur til at sanera tær ringast staddu kommunurnar fyri, hava á fundi samtykt at krevja peningin aftur. Nú er nevnd sett at arbeiða víðari við málinum**

KOMMUNU-SANERING
*Áki Bertholdsen*



*–Vit fara nú at krevja peningin aftur, sum Kommunali Veðhaldsgrunnurin ognartók frá okkum, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður í Sjóvar Kommunu. Níggju kommunur hava havt fund um málið, men nú verða fleiri aðrar kunnaðar um støðuna.*

Tær kommunurnar, sum ikki játtaðu, at Kommunali Veðhaldsgrunnurin kundi brúka pening at sanera tær ringast staddu kommunurnar fyri, fara nú at krevja peningin aftur.

Beinanvegin tað varð greitt, at pengar vórðu brúktir úr Kommunala Veðhaldsgrunninum, til at sanera kommunuskuld hjá nøkrum kommunum fyri, vóru tað summar kommunur, sum gjørdu vart við, at tær fóru at krevja sín part av pengunum aftur. Um neyðugt fóru tær at leggja sak ímóti grunninum.

Tá ið peningurin skuldi gjaldast úr grunninum til at sanera nakrar kommunur, skuldu allar kommunur senda grunninum eina váttan uppá, at tær góðtóku, at pengarnir blivu brúktir til endamálið.

Men tað vóru fleiri kommunur, sum ikki sendu váttanina inn aftur. Vit hava fingið upplýst, at tað vóru heilar 35 kommunur, sum ikki játtaðu grunninum at brúka pengar til at sanera kommjnuskuld við.

– Sostatt hava tær ikki givið tilsøgn um, at pengarnir í Kommunala Veðhaldsgrunninum kunnu brúkast til at sanera skuld hjá summum kommunum við, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður á Strondum.

Hann var ein av teimum, sum beinanvegin gjørdi greitt, at tað varð ikki góðtikið, at pengar hjá Sjóvar Kommunu blivu brúktir til at sanera skuld hjá øðrum komunum við.

Hann gjørdi samstundis greitt, at teir fóru at krevja at fáa tað aftur, sum Sjóvar Kommuna átti í grunninum.

Síðani hevur tað verið roynt at fáa allar kommunurnar, sum ikki vildu góðtaka saneringina, at gera eitt felags krav krav ímóti grunninum.

Fyribils vórðu kommunur, sum ikki vildu góðtaka saneringina, kallaðar saman til fundar í Havn seinasta hósdag at viðgerða støðuna.

Eivind Jacobsen sigur, at umboð fyri níggju kommunur møttu upp. Men nú fáa hinar kommunurnar, sum ikki játtaðu grunninum at brúka pengar til saneringina, eina frágreiðing um tað, sum fór fram á fundinum.

Eivind Jacobsen sigur, at fundurin valdi eina trýmannanevnd at arbeiða víðar i við málinum.

Umframt hann sjálvan, eru Annfinn Brekkstein av Velbastað og Sofus Johannesen við Gjógv, í nevndini.

### Ólógligt

Eivind Jacobsen sigur, at avtalan er nú, at hendan trýmannanevndin skal nú tosa við landsstýrið og stýrið fyri Kommunala Veðhaldsgrunnin um støðuna .

– Samstundis fara vit at krevja peningin aftur.

Hann sigur, at førir hetta ikki til eina loysn á málinum, ivast hann ikki í, at farið verður víðari við málinum, og at málið verður lagt fyri rættin. Hetta var tó ikki umrøtt so nógv á fundinum. Men í øllum førum er hann púravísur í, at Sjóvar Kommuna fer at royna málið í rættinum. Aðrar kommunur, eitt nú Hósvíkar Kommuna, hava eisini boðað frá, at tær fara at taka neyðug stig fyri at fáa pengarnar aftur.

Eivind Jacobsen sigur, at talan er um einar 30-35 milliónir, sum tær kommunurnar eiga í grunninum, sum ikki vildu játta, at pengar blivu brúktir til sanering.

– Á fundinum hósdagin fingu vit eisini eina lógfrøðiligafrágreiðing. Og niðurstøðan hjá honum var tann sama, sum hinar løgfrøðiligar niðurstøður, ið eru gjørdar í hesum máli. Og tað er at tað var ognartøka, tá ið Kommunali Veðhaldsgrunnurin brúkti pengar hjá summum kommunum at sanera skuld hjá øðrum kommunum við, uttan at tær kommunur, sum áttu peningin, høvdu givið tilsøgn til tað.

Eivind Jacobsen leggur afturat, at á fundinum seinasta hósdag, vóru tað fleiri kommunur, sum greiddu frá, at tær høvdu spurt seg fyri lógfrøðingi, men at allir komu til sama úrslit.

# Ingeborg væntar strævnar samráðingar

**Tað er nú greitt, at allir sáttmálarnir hjá Føroya Arbeiðarafelag verða sagdir upp. Ingeborg Vinther væntar at samráðingarnar verða strævnar**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt av at siga allar sáttmálarnar upp. Ingeborg Vinther væntar strævnar samráðingar og hendan komandi tíðin skal brúkast at leggja taktikkin til reiðar í*

Tað er nú greitt, at Føroya Arbeiðarafelag fer at siga allar sáttmálarnar upp í ár.

Tað hevur felagið gjørt av, og Ingeborg Vinther, forkvinna, sigur, at uppsagnirnar verða sendar Føroya Arbeiðsgevarafelag í hesi vikuni.

Seinasta freist at siga sáttmálarnir er 28. februar.

Sáttmálarnir, sum nú verða sagdir upp, eru bæði høvuðssáttmálin við Føroya Arbeiðsevarafelag, umftramt allir sersáttmálarnir.

### Strævnar samráðingar

Ingeborg Vinther væntar, at samráðingrnar hesuferð fara at vera strævnar.

– Men tað eru vit til reiðar til, leggur hon afturat.

Enn hevur felagið ikki gjørt krøvini upp.

Men hon sigur, at tað er onki at ivast í, at talan verður um nógv ymisk krøv á fleiri økjum.

Eitt nú ivast hon ikki í, at tey fara at krevja lønarhækking. Men umframt tað fara tey at krevja at arbeiðsgevararnir betala til eina eftirlønirskipan, umframt at talan eisini verður um onnur krøv.

Enn er tað ikki gjørt av, hvussu samráðingarnar verða skipaðar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur lagt upp til, at samráðingarnar skulu byrja tíðliga í ár.

Men Ingeborg Vinther ger púra greitt, at tey fara ikki til samráðingarborðið, fyrrenn hini feløgini eisini gera tað.

– Vit fara ikki at samráðast einasamøll, leggur hon dent á. Vit fara heldur ikki at leggja krøvini fram enn, sigur hon. Tað veldst alt um, hvussu hini feløgini fyrihalda seg.

hendan komandi tíðin skal sostatt brúkast at gera krøvini upp og til at leggja taktikkin fyri samráðingunum.

Eitt nú skulu feløgini tosa um møguleikan fyri at samráðast í felag.

Einaferð í næstum skal fundur verða ímillum Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag og tey bæði feløgini í Klaksvík, fyri at vita, um møguleiki er fyri, at feløgini skulu samráðast í felag ella um, hvussu tey skulu fyrihalda sær.

Nýggjan bil?

OPEL ASTRA



Leitar tú eftir nýggjum bili?
OPEL Astra fæst í fleiri variantum við ymiskum motorum, - eisini diesel. Trygdin er sett í hásætið, hann er sera økonomiskur, hevur framúr góðar koyrieginleikar og vakurt design.
Og so fæst hann eisini við sera nógvum hentleikum.

**Komið og roynið hann.**

**Prísir úr 159.000,- kr.**

Bilurin hevur 12 ára rustgaranti.

**OPEL við Oyggjarvegin**
**P/F Meinhardt Arge**
**Tel 31 61 61 - Fax 31 83 18**